


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 15 - 03 - 2012

# Føroyingar í frálandavinnu á Facebook

Havnarmaðurin Rógvi Finnsson Johansen, sum arbeiðir í norsku oljuvinnuni, hevur tikið stig til ein spildurnýggjan bólk á Facebook, ið nevnist - Føroyingar í frálandavinnuni. Longu nú eru meira enn 100 føroyingar partur av hesum nýggja netverkinum. Facebookbólkur Eitt stórt tal av føroyingum arbeiða í dag í olju- og frálandavinnuni, heima sum burturi. So nógvir eru hesir í tali, at skráseta vit hesi fólkini sum arbeiðandi í eini og somu vinnu, so man olju- og frálandavinnan vera tann einstaka vinnugreinin, har flestu føroyingar í dag arbeiða. Vitandi at arbeiðsloysi er stórt í Føroyum, at nógvir útbúnir føroyingar standa í bíðirøð til at fáa arbeiði í hesi vinnu, og at nógv ung eisini royna at útbúgva seg til at kunna arbeiða í vinnuni, hevur leingi verið tørvur á einum netverki, har føroyingar í hesi vinnu kunnu kenna seg heima og samskifta við starvsfelagar. Hetta hevur fingið havnarmannin Rógva Finnsson Johansen, sum arbeiðir í norsku oljuvinnuni, at taka stig til ein Facebookbólk fyri føroyingar í frálandavinnuni. Hetta ger hann lutvíst fyri at savna nakrar av teimum mongu innan vinnuna, sum hann kennir og fyri at stuðla upp undir eitt miðvíst netverk fyri øll við áhuga fyri vinnuni. Eisini fyri at gera mangar av hesum anonymu føroyingunum meira sjónligar í føroyska samfelagnum. Byggja upp netverk Oljan. fo vitjaði Rógva á arbeiðsplássi hansara í Stavanger í farna mánað. (Reportasja frá hesi vitjan kemur á oljan.fo seinni) Rógvi arbeiðir hjá norsku tilbúgvingarfyritøkuni ACONA, sum veitir tænastur til eitt nú oljufeløg, sum bora og arbeiða á norska landgrunninum. Seinasta uppgáva teirra hevur verið at halda skeið fyri starvsmanningini hjá føroyska oljufelagnum Faroe Petroleum í Stavanger. Hesi skulu í næstum til at standa fyri eini leitiboring á norska landgrunninum. Vit spurdu Rógva, hvussu tað ber til, at hann nú hevur tikið stig til at stovna ein facebookbólk fyri føroyingar, sum arbeiða í frálandavinnuni? Tað er hópur av føroyingum innan

frálandavinnuna, ikki bert í Nordsjónum og Norskahavinum, men eisini kring allan heim. Gjøgnum arbeiði mítt, í fyritøkuni ACONA, ið er undirveitari innan boring, HSE og tilbúgving, hitti eg oftani føroyingar. Á øllum stigum og plássum. Teir eru á vaktar- og supplyskipum, bori- og framleiðslupallum, á landi í oljufeløgum og hjá undirveitarum og tyrlufeløgum. Tad er altíð hugaligt at hitta føroyingar, ið eru dúligir at bjóða einum at vitja, privat, á skrivstovum, umborð og at síggja teirra arbeiðspláss. Týðandi vitan Hetta er eisini týdningarmikil vitan, í einum altjóðagjørdum heimi, har netverk kann hava alstóran týdning. Fyri meg hevur slíkt netverk oftani gjørt meg føran fyri at fáa hendur á týdningarmiklari vitan og knýta arbeiðslig sambond, ið annars kunnu taka langa tíð. Ætlanin er í fyrsta umfari at brúka hendan bólkin til at vita, hvar føroyingar eru, hvussu nógv/ir vit eru. Og ikki minst at varðveita og knýta persónlig og faklig sambond. Bólkurin er ætlaður at vaksa við, at limirnir bjóða føroyskum vinfólkum innan allar greinir av frálandavinnuni, rig, framleiðslu, exploration, vaktarskipum, Supply, HSE, flutning, tilbúgving vm. við í bólkin! Vitan um ymisk øki, hvat tey ymsu arbeiða við, tvørfaklig vitan, er gull verd í einihvørjari vinnu. Ikki minst frálandavinnuni. Vónandi fara vit at fáa áhugaverd tjak í hesum bólkinum? Sum frá líður kann hesin bólkurin verða vid til at gera okkum meiri sjónlig í restini av samfelagnum og vitan um, hvar føroyingar arbeiða. (Rógvi Finnsson Johansen rogvi.johansen@acona.com) Oljan.fo fer eisini at vera partur av hesum netverki og fylgja arbeiðinum og lívsleiðini hjá teimum mongu føroyingum, sum eru virknir í hesi vinnu og ikki minst at vera við til at lata upp dyr fyri øðrum føroyingum, ið ætla sær at gerast partur av hesi vinnu. Oljan.fo hevur stovnað ein opnan bólk á Facebook undir heitinum -  "oljan.fo". Øll eru vælkomin at gerast limir. Hava tit annars onkra søguna at siga frá, kenna tit fólk í hesi vinnu, sum tit halda eiga eina søgu at siga frá, so latið okkum frætta. Myndir -  Rógvi Finnsson Johansen til arbeiðis hjá tilbúgvingarfyritøkuni Acona í Stavanger. Myndir oljan.fo/Jan Müller